Frí 26/01/2024 11:19

Fylgiskjal 10

Til Uttanríkis- og vinnumálaráðið,

Umhvørvismálaráðið takkar fyri høvi at gera viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti
(Ásetingar um kortlegging og skanning í sambandi við nettrygd og um at nágreina ásetingar um at savna upplýsingar)

Sum skilst er kjarnan í uppskotinum, at tørvur er á at seta í verk átøk, sum fremja nettrygd í Føroyum og at Fjarskiftiseftirlitið sambært lógaruppskotinum fær heimild at gera portraskanningar av interneti, ið økir um nettrygdina, og heimild at savna inn, skráseta og viðgera upplýsingar um samfelagstýðandi undirstøðukervi. Ein orsøk til lógaruppskotið er dómurin frá 2019, har Fjarskiftiseftirlitið í Føroya Rætti varð dømt at viðurkenna, at Fjarskiftiseftirlitið ikki hevði heimild til at krevja eina frágreiðing útflýggjaða, sum nevndin í Føroya Tele hevði umbiðið. Føroya Rættur legði m.a. dent á, at frágreiðingin varð ætlað til innanhýsis nýtslu, at umbønin ikki hevði støði í eini klagu og at frágreiðingin innihelt subjektivar metingar.

Ætlanin við broytingunum í § 58, stk. 2, er at gera greitt, at Fjarskiftiseftirlitið kann savna inn tær upplýsingar, dátur o.a., sum Fjarskiftiseftirlitið metir hava týdning fyri virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum, óansæð um upplýsingar og dátur eru umbidnar sum liður í vanligum eftirlitsvirksemi, innkomnum klagum ella um talan er um frágreiðingar o.a., sum verða gjørdar til innanhýsis nýtslu hjá teimum, sum koma undir eftirlitsskyldu.

Umhvørvismálaráðið hevur ongar viðmerkingar til uppskotið og tekur undir við tí.

Vinaliga,

Anni á Hædd
løgfr. Ráðgevi

Umhvørvismálaráðið
Ministry of Environment
Tel. +298 306600 • Mobile +298 556088

Anniah@umhvorvi.fo • www.umhvorvi.fo